


# Statoil leggur 2 milliardir á borðið fyri at sleppa undan at bora

**Jógvan Hugo Gardar**

22.11.2014 - 09:09

Oljan.fo

Leiðslan í Statoil hevur tikið avgerð um at siga upp eina avtaku um at brúka boriskipið Stena Carron til eina boriætklan uttanfyri Angola.

Í einum boðum til keypsskálan sigur Statoil at avtalan um boriskipið er søgd upp at fara úr gildi 21. november. Upprunaliga var ætlanin at Statoil skuldi leiga boriskipið í tvey ár afturat, men boriúrslitini hava ikki givið tað Statoil vónaði.

Statoil undirskrivaði annars avtaluna um Stena Carron í mars 2013, og skuldi rinda 650.000 dollarar um dagin fyri leiguna.

Nú hevur Statoil so valt at siga upp avtaluna, og leggur góðar tvær milliardir krónur á borði fyri at siga upp samstarvið.

Á norska landgrunninum hevur Statoil útsett leiguna í styttri tíðarskeið fyri boripallarnar COSLPioneer, Transocean Spitsbergen, Scarabeo 5 og Songa Trym